

*– Hatta var ikki nóg gott. Tey vilja hava onkran, sum kann seljast í Danmark. Vit eru øðrvísi. Hetta var fyrsta viðmerkingin hjá Knúti H. Eysturstein, sum er urguleikari í Gestum*

Gestir í Skanderborg:

# Gestir vitjaðu ov stutt

**Ein av vinningunum hjá Gestum fyri at vinna Prix Føroyar 2003 var at spæla við í Starfighters-kappingini á Skande rborg-festivalinum. Tað gjørdu teir, men vunnu ikki fram millum trý tey bestu orkestrini, sum dómararnir valdu.**
**- At spæla fyri 50 og fanga tey, so hevur man vunnið tey, segði Knút H. Eysturstein, urguleikari, tá úrslitið var kunngjørt og Gestir ikki vóru í milllum vinnararnar.**

*Øssur Winthereig*
*ossur@post.olivant.fo*

Gestir vitjaðu Skanderborg-festivalin, men vitjanin var styttri enn ætlað og vónað.

– Hatta var ikki nóg gott. Tey vilja hava onkran, sum kann seljast í Danmark. Vit eru ørðvísi. Tað vóru fyrstu orðini frá urguleikaranum í Gestum, Knúti H. Eysturstein, eftir at úrslitini av tónleikakappingini Starfighters vórðu lisin upp á pallinum "Den blå Planet".

12 orkestur ella bands, sum tað eitur nú á døgum, vóru við í hesi kappingini, sum er fyriskipað av, Danmarks Radio P3, Boogie og tónleikablaðnum Gaffa. Kappingin er ein talentkapping. Hini orkestrini høvdu verið við í fleiri kappingum í Danmark og vóru so endaði í finaluni í Skanderborg.

Gestir vunnu Prix Føroyar kappingina, og tað var teirra vegur inn í Starfighters.

Virðislønirnar vóru lokkandi fyri nummar eitt, tvey og trý. Nummar eitt fekk plátusáttmála og skuldi spæla á stóra pallinum á Festivalinum sunnudagin við eini 15.000 til 20.000 áhoyrarum. Tey trý bestu skuldu eisini ferðast runt í Danmark til onnur tónleikatiltøk- á turné.

Men tað gekk bara ikki.

### Mussaðu og lurtaðu

Klokkan fimm seinnnapartn leygardagin, meðan 30.000 fólk lógu, spákaðu, mussaðust, drukku øl ella sólaðu sær í 29 stigum, gjørdu fimm føroyingar seg klárar á pallinum.

Eini 30 fólk stóðu klár at hoyra Gestir. Onkur hevði føroysk fløgg við – ja, ein hevði eitt í fullari landsliðsstødd.

Samskiparin av Prix Føroyum, Fróði Vestergaard, var komin til Danmarkar sama dag. Hann var enn í kowboy-buksum, sum ikki vóru ætlaðar til 29 stig. Hann var stoltur yvir eykavinningin, sum tey høvdu funnið uppá til vinnararnar á Prix Føroyum.

– Tað verður gott. Teir hava vant nógv og hava vant nógv nýggj spennandi ljóð. Hetta er størri enn "Stjerne for en aften", helt Fróði Vestergaard.

Thora Augustinussen stóð millum tey fremstu 30 og smíltist og var ómetaliga spent:

– Eg eri komin niður í dag bara at lurta eftir Gestum. Vit kennast. Ongin veit, at eg eri niðri. Eg mátti bara avstað.

Nú vóru eini 40 fólk komin at lurta. Áðrenn Gestir, høvdu Stomped spælt. Heavy Rock við báðum hondum uppi yvir høvdinum – næstan allatíðina. Og plássið inni í tjaldinum á "Den blå Planet" var so at siga fult. Vaksin og børn fylgdu Stomped – nakrir tatoveraðir tónleikarar, sum helst vóru eitt tónleikaættarlið eldri enn Gestir. Og teir vunnu eisini. Men nú vóru tað Gestir.

### Vit eru Gestir

50 fólk vóru nú í tjaldinum – teirra millum tveir skotar í kilti og berir oman fyri kiltið. Tað var ikki møguligt at staðfesta um sama var galdandi undir kiltinum.

– Vit eru Gestir. Vælkomin á konsert, segði Knút H. Eysturstein, og so hevði Skanderborg Festival vitjan av føroyskun Prix-Føroyar vinnarunum Gestum.

Ein hálvan tíma við gestatónleiki. Fýra dómarar skuldu meta um tónleikin hjá teimum 12 orkestrunum, sum høvdu spælt tríggjar dagar. Trý orkestur hvønn dag og Gestir sum teir seinastu.

Nú var vinningurin frá Prix Føroyar kappingini brúktur. Gestir høvdu á ferðini ein maneykjara - Clickhaze-mannin Jens L. Thomsen. Tá Gestir vóru lidnir dugdi hann at siga:

– Feitt, ha?

### Góðar greyðir og gott at spæla

Thora var sloppin afturum pallin og stóð og trippaðu eftir gestunum, sum hon var komin til Danmarkar at lurta eftir. Hon var so glað, tí tað hevði gingið so væl, helt hon.

Ongin av gestunum er nakar snakkari. Ólavur Hansen, sangarin í bandinum, helt beint eftir konsertina:

– Jú, ein plátukontrakt er upp á spæl, men tað hugsar man ikki um á pallinum.

Knút H. Eysturstein:

– Jú hetta var stulligt. Her var gott at spæla og vit høvdu góðar greyðir.

– Vit eru sera vælviðfarnir og vit búgva væl, helt Knút fyri, Teir búðu á einum vallaraheimi beint við festivalin.

Nú vóru tveir tímar at bíða eftir, hvussu væl Gestir vóru viðfarnir av teimum fýra dómarunum.

### Vónirnar minni

Mister G-festival Sólarn Solmunde gekk runt við T-shirt, har Gestir stóð á. Hann royndi at síggja kul út, men beint áðrenn úrslitið var lisið upp, var hann eisini spentur:

– Vit vænta tað ringasta. Vónirnar eru ikki so góðar nú, sum tær vóru. Gestir var besti bólkur, men eg veit ikki. Bara teir blíva nummar eitt, tvey ella trý, so sleppa teir á turné. Tað kann tað koma nógv burturúr.

– Vit koma ikki víðari. Tað rokni eg bara ikki við, segði Ólavur Hansen beint áðrenn úrslitið. Og hann fekk rætt:

Tað gekk bara ikki!

### Fangaðu 50 og vunnu

Tá nummar trý ikki vóru Gestir og heldur ikki nummar tvey og heldur ikki nummar eitt, so valdu Ólavur Hansen, Torfinnur Jákupsson, Knút H. Eysturstein, Niels Jákup í Jógvansstovu og Jógvan Andrias á Brúnni at standa høviskir og geva vinnarunum lógvabrestir og lata sum um hetta var einki serligt.

– Vit fangaðu tey 50 fólkini, sum lurtaðu eftir okkum, so á tann hátt vunnu vit. Tað er tað, tað handlar um, var positiva niðurstøðan hjá Knúti H. Eysturstein.

– Nú eru kappingarnar lidnar, nú skulu vit bara til Føroya at spæla okkara tónleik. Næsta er Listastevnan.

Tá Thora hevði hoyrt endaliga úrslitið sást hennara andlit. Skrikt saman í eina góðum gomlum prutli (prrrrrrrrrrrrrrtttllll):

– Hatta mást tú gjarna sitera meg fyri, segði Thora, sum var súr ella bara kedd.

Fróði Vestergaard stóð sum Kánus. Skilti ikki, at Gestir – besta rokkorkestrið í Føroyum 2003 – als ikki sluppu í part.

– Hatta var skuffandi. Gestir vóru mest orginalir. Teir vóru eisini betri enn teir, sum vunnu! Ljóði eg sum ein ringur tapari?? Men eg eri ikki samdur við úrslitið hjá dómarunum, var niðurstøðan hjá samskiparanum av Prix Føroyum, sum kortini heldur at luttøka á Skanderborg festivalinum og í Starfighters-kappingini er ein góður síðuvinningur hjá Prix Føroyar-vinnarunum.







*Ólavur Hansen, sangari í Gestum, hevði ikki klipt sær, hóast nógva hitan í Danmark.*
*– vit fangaðu tey 50 fólkini, sum lurtaðu eftir okkum, so á tann hátt vunnu vit.*
*Tað er tað, tað handlar um, var positiva niðurstøðna hjá Knúti H. Eysturstein*

# Tónleikur og ikki gestaupptraðkan

UMMÆLI

*Astrid MacDonald*

Hóast tey høgu hitastigini, hevði Ólavur Hansen, sangari, valt at lata tær tjúkku purlurnar sita. Hárið er tó vaksið síðan Prix Føroyar - kappingina, nú dekka purlurnar eyguni heilt. Eygnakontakt er ikki tað, teir spæla uppá. Í heila tikið er tað ikki upptraðkanin, sum hevur týdning – har eru teir alt ov tamir, haldi eg.

Harafturímóti spæla teir tónleik, so tað forslær. Konsertin byrjaði við lagnum "Verðin druknar".

Tað er eitt flott lag, og niðurlagið so deiliga forloysandi. Tað sama er galdandi fyri hini løgini, at niðurlagið kemur brestandi sum ein bumba og lamenterar gjøgnum luftina. Herligt! Feitt! Teir spæla sera presist og eru væl samanspældir. Og teimum dámar tað.

Men hvat snúgva sangirnir seg um? Ja, tað er ein góður spurningur viss eg sjálv skal siga tað. Tí eg hoyrdi bert einstøk orð inn ímillum, "verðin druknaaaar" og "avgongaaaaahhh" hini orðini druknaðu burtur í tónleikinum. Møguliga hevur tað ikki tann stóra týdningin fyri teir – boðskapurin liggur í ljóðinum. Eitt lag æt Krakk – áhugavert hevði verið at vitað, um tað er krakkið í Føroyum í 80'unum, ommusa grøni krakkur ella tað at fáa krakk, teir sungu um.

Men um boðskapurin liggur í ljóðinum, leveraðu teir vøruna! Tí tað var skitigott! Og á onkran hátt poetiskt eisini. Sangarin Ólavur við síni vøkru rødd, ljómborðsspælarin Knút við melodiøsum fingrum á tangentunum, bass-spælarin Niels Jákup við væl upplagdum og beinraktum spæli, trummusláarin Jógvan Andrias sum ein annar Animal (hann sjálvur frá Muppet Show), sera, sera góðar trummur, og síðst, men ikki minst, gittarspælarin Tórfinn. At duga so væl at spæla upp á ein gittar sum hongur niðri á knøunum, er fantastiskt. Og hann dugdi væl at vera á pallinum – høvdið rullaði og hann rokkaði við – saman við ljómborðsspælaranum Knút hevði hann mest palltekki, haldi eg.

Niels Jákup fekk ein prís – tann sokallaði "fiduspokal", fyri sítt kula bassspæl. Skilji tað væl. Hann dugir, hasin jassurin.

Samanumtikið eitt upplivilsi av teimum góðu – óluksáligt at teir ikki vunnu.

